# Skótalív – besta lív fyri okkum er

**Soleiðis byrjar ein skótasangur, sum vit plaga at syngja, tá skótarnir sita runt um legubálið**

*Tíðindaskriv*

Skótarørslan, sum byrjaði í Bretlandi fyri skjótt 100 árum síðani, hevur nógv gott at geva børnum og ungum í dag. Við at fara út í náttúruna við teimum, læra tey at leggja merki til alt tað vakra, vit har síggja og at fara væl um, og at bera seg skilagott at á gongutúrum.

Síðani læra tey at gera okkurt til matna uttandura, og eisini at arbeiða saman í felag, soleiðis at hvør hevur sína uppgávu at loysa.

At sita runt um legubálið og syngja ella framføra okkurt skemt, dámar skótun eisini væl. Síðani verður kvøldið endað við andakt og skótabønin sungin.

Vit KFUM og KFUK skótar leggja eisini dent á, at vit eru við í einum kristinum felagsskapi, soleiðis at kristintrúgvin hoyrir við til lívið.

*Skótalív – besta lív fyri okkum er,*
*mangt og hvat læra vit har á hvørji ferð*
*stuttligt er altíð tá hvønn ein bjartan dag,*
*gjøgnum dal – upp um fjøll fert tú í góðum lag.*
*Dagur hvørvur, og nátt er nær,*
*góði Guð faðir ver hjá mær og tær,*
*gevur manga góða stund,*
*alt vit byggja á kristina grund.*

**Skótafundir eru hvørja viku:**
Mánakvøld klokkan 19: Yngri og eldri smáskótar (frá 7 til 10 ár)
Týskvøld klokkan 19: Miðskótar (11 til 14 ár)
Hóskvøld klokkan 19: Ungdómsskótar (ung frá 15 ár og eldri, fyrsti fundur 26. aug.)

Skótafundirnir verða hildnir í KFUM og KFUK í Klaksvík

# Teitur á drúgva konsertferð

**Teitur Lassen er farin á eina nýggja konsertferð, sum fer at varða í 11 vikur**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*



*Næstu 11 vikurnar skal Teitur Lassen hava konsertir í 8 londum*

Teitur Lassen hevur seinastu árini verið nógv á ferð við tónleikinum hjá sær. Langt áðrenn hann fekk sáttmála við plátufelagið Universal ferðaðist hann nógv í USA og Europa.

Endamálið var at spæla allastaðni, har hann slapp framat, at hitta fólk í tónleikavinnuni og at skriva nýggjar sangir.

Hetta gav eisini úrslit, tá ið hann gjørdi sáttmála við Universal, og síðani hevur fingið ein fløgu givnað út kring heimin.

Síðani »Poetry and Aeroplanes« kom á marknaðin í USA, Europa og aðrastaðni, hevur Teitur havt ein ørgrynnu av framførslum – bæði smærri og størri.

Teitur hevur serliga spælt í USA, men hann hevur eisini fleiri ferðir verið á vitjan í Norðurlondum.

**Nýggj konsertferð**

Nú er Teitur farin á eina nýggja konsertferð, og hesaferð er hann ikki einsamallur um framførslurnar. Hann hevur ein bólk saman við sær, og Teitur og hansara tónleikakrar fara komandi 11 vikurnar at spæla í átta londum.

Mikukvøldið hevði Teitur konsert í Los Angeles, og síðani verða aðrar konsertir í USA. Frá 1. september til 11. september spælir Teitur í Norðurlondum, síðani skal hann vitja Týskland, Holland, Eysturríki, Ongland og Kanada, áðrenn konsertferðin endar í USA síðst í oktober.

Teitur hevur gjøgnum sínar mongu konsertir fingið alsamt fleiri fjepparar, og sølan av fløguni hjá honum hevur gingið støðugt hetta seinasta árið.

Tann nýggja konsertferðin fer uttan iva at økja enn meira um áhugan fyri tí føroyska tónleikaranum.

## List í Focus

Fríggjadagin tann 27. august frá klokkan 16 til 18 sýnir Eyðun av Reyni fram í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20. Framsýningin er opin fram til tann 10. september.

# Leiklistaráðið mannað

**Nýggja leiklistaráðið er nú mannað. Annika Sølvará verður fyrsti formaður ráðsins**

LEIKLISTARÁÐ
*tíðindaskriv*

Leiklistaráðið hevur heimild í løgtingslógini um Tjóðpall Føroya. Við hesum er fyrsta stigið at stovnseta Tjóðpall Føroya tikið, og gongur sum ætlað fer stovnurin veruliga í gongd við leiklistaliga virksemið 1. januar 2005.

Leikistaráðið virkar sum stýri fyri Tjóðpall Føroya. Ein av uppgávum leiklistaráðsins er at seta stjóran fyri Tjóðpallin. Leiklistaráðið hevur harumframt aðrar yvirskipaðar uppgávur í sambandi við yrkisleiklist og leiklist sum heild.

Leiklistaráðið verður valt fyri trý ár í senn og telur sjey fólk. Landsstýrismaðurin skal tilnevna tvey umboð, harav annað verður formaður. Hinir limirnir í leiklistaráðnum verða tilnevndir av ávikavist Leikarafelag Føroya, Meginfelag áhugaleikara Føroya, Listafólkasambandi Føroya, Tórshavnar kommunu umframt eitt umboð fyri starvsfólkini á Tjóðpalli Føroya.

Anniku Sølvará, setursskrivari á Fróðskaparsetri Føroya, er útnevnd til formann í leiklistaráðnum, og Martin Mouritsen, leiðara á Musikkskúlaskipanini, til ráðslim.

Hinir limirnir í leiklistaráðnum eru: Laura Joensen fyri Leikarafelag Føroya, Dánjal Joensen fyri Meginfelag áhugaleikara Føroya, Jón Thorsteinsson fyri Listafólkasamband Føroya og Jákup Simonsen fyri Tórshavnar kommunu. Sum starvsfólkaumboð hevur landsstýrismaðurin fyribils tilnevnt Jenny C. Petersen, fyrisitingarleiðara í Leikhúsinum Gríma, í leiklistaráðið til nýggi stovnurin er komin at virka.

Leiklistaráðið fer til verka beinanvegin og verður væntandi lýst eftir stjóra til Tjóðpall Føroya seinni í heyst.



*Annika Sølvará er útnevnd sum fyrsti formaðurin í leiklistaráðnum*

# Málfundur í Føroyum

**Tíðindaskriv**

Dagarnar 27. og 28. august verða umleið 50 norðurlendskir málfrøðingar savnaðir til fundar í Havn. Talan er um tann árliga norðurlendska málfundin, sum hesa ferð verður hildin í Føroyum. Tað eru tær norðurlendsku málnevndirnar, sum skiftast um at skipa fyri fundi. Á fundinum hittast umboð fyri málnevndirnar í Norðurlondum. Umboð eru úr Danmark, Noregi, Svøríki, Finnlandi, Íslandi, Grønlandi og Sámalandi. Í ár er tað Føroyska málnevndin, ið skipar fyri. Hetta er 51. árið, at hesin fundur verður hildin. Seinast hann varð hildin í Føroyum var í 1998. Evnið fyri henda fundin er málnormering og málbroytingar.

Stuðlað hava Málráð Norðurlanda, Tórshavnar býráð, Føroya banki, Føroya sparikassi, Letterstedtska föreningen, Smyril Line og Fróðskaparsetur Føroya.

# Dj og karaoke-show

Leygarkvøldið 28.august kl 23.30-03.30 verður stórt Dj-show og karaoke tiltak í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Nýggjar karaokefløgur eru komnar til landið, og leygarkvøldið verður fyri fyrstu ferð høvi at royna sanggávurnar til nýggju karaoke-fløgurnar. Millum hundratals løgini eru eru m.a. This love hjá Maroon 5 og Summernights úr filminum Grease.

Eisini verður Dj-show, har Elin í Stórustovu og Jákup Jacobsen verða vertir.

Elin í Stórustovu fer, umframt at vera vertur, at royna seg sum Dj, saman við Mark Joensen. Eysturoyarleiðin (505220), Havnarleiðin (595959) og Vágaleiðin (217752) koyra til tiltakið, sum kostar 120 kr.

eys


LANGUR LEYGARDAGUR

í miðbýnum opið er til kl. 17.00 28. august 2004


